# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 21. februar 2006, kl. 19⁰⁰.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Jákup Oluf Hansen, Pauli Trond Petersen, Øssur Christiansen, Jóhan Hendrik Hansen og Marjun S. Olsen.
**Skrivari:** Jákup Durhuus.

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð:**

**Mál 17.**
Tilmæli frá Mentunarnevndini til tilboð frá **Sp/f Hjálpirótini** uppá viðlíkahald í nýggja kirkjugarðinum.
J. nr. 2005-240
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum.

**Viðv. 17.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 18.**
Tilmæli frá somu um at seta persón til at taka sær av umsitingini av grønu økjunum í kommununi.
J. nr. 2005-246
Nevndin mælir til skjótast gjørligt at søkja eftir einum persóni.

**Viðv. 18.**
Tilmælið samtykt við 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi blankt.

**Mál 19.**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd til umsókn frá **Oyvildi Haldansen** um broyting í byggiloyvi til sethús soleiðis, at hann fær loyvi til at byggja ætlaðu sethúsini á matr. nr. $360^{\underline{k}}$ í staðin fyri matr. nr. $360^{\underline{c}}$.
J. nr. 2001-551
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 19.**
Tilmælið samtykti við 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi blankt.

Jón Mikkelsen var ikki við til viðgerðina av máli nr. 20, tí at hann ætlandi skal keypa frábýtta partin.

**Mál 20.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Kára Nielsen** um sundurbýti av matr. nr. $162^{\underline{a}}$.
J. nr. 2005-247
Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 20.**
Tilmælið einmælt samtykt.

Jón Mikkelsen komin aftur á fundin.

**Mál 21.**
Tilmæli frá somu til tilboð frá **RN-maskinverkstaði** uppá handlista niðan við doktaragarðinum.
J. nr. 2005-230
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum.

**Viðv. 21.**
Tilmælið samtykt við 6 atkvøðum fyri og 1 ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi ímóti við teirri viðmerking, at handlistin heldur átti at verið gjørdur úr træi; hetta tí at nógv fólk ganga niðan við garðinum, og tá er ein handlisti úr stáli sera óheppin.

**Mál 22.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Jónfinn Egilsnes** um byggiloyvi til opnahjall og vindfang fast í sethúsini (grundina) á matr. nr. $282^{\underline{ø}}$.
J. nr. 2005-239
Nevndin mælir til at ganga umsókníni á møti.

**Viðv. 22.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 23.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Kristian Petersen** um byggiloyvi til sethús á matr. nr. $310^{\underline{c}}$.
J. nr. 2005-237
Nevndin mælir til at ganga umsókníni á møti.

**Viðv. 23.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 24.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Petur Højgaard** um byggiloyvi til neyst á matr. nr. $23^{\underline{h}}$.
J. nr. 2005-196
Nevndin mælir til at ganga umsókníni á møti.

**Viðv. 24.**
Av tí, at ivasamt er, um ætlaða byggingin er sambærilig við ásetingarnar í byggisamtyktini, varð einmælt samtykt at beina málið aftur í Teknisku Nevnd.

**Mál 25.**
Tilmæli frá Havnarnevndini til áheitan frá **Vestmanna Tourist Centre** um at kommunan átekur sær part av rakstrinum av wc-unum á Fjørukrónni.
J. nr. 2005-225
Nevndin mælir til ikki at átaka sær part av rakstrinum.

**Viðv. 25.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 26.**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini til umsókn frá **SÍF** um stuðul til koyring av vestmannadreingjum til fótbóltsvenjing í Sandavági.
J. nr. 2005-233
Nevndin mælir til at stuðla við 10.000 kr, og at upphæddin verður játtað av kontu nr. 690130: studningur og aðrar útreiðslur.

**Viðv. 26.**
Tilmælið samtykt við 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi blankt.

**Mál 27.**
Tilmælir frá Mentunarnevndini og Fíggjarnevndini til umsókn frá **Ungtemplarafelagnum Heyggi** um stuðul/gávu í samband við, at felagið tann 23. apríl í ár verður 25 ár.
J. nr. 2005-238
Mentunarnevndin mælir til at veita stuðul/gávu, men at fíggjarnevndin ásetir upphæddina.
Fíggjarnevndin mælir til at stuðla við 5.000 kr, og at upphæddin verður játtað av kontu nr. 450030: mentunartiltøk.

**Viðv. 27.**
Tilmælini einmælt samtykt.

Jóhan Hendrik Hansen var ikki við til viðgerðina av máli nr. 28, tí at hann vegna P/F Mariu Poulsen hevur givið tilboð uppá rørfittings v.m. í samband við arbeiðið.

**Mál 28.**
Tilmælir frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini um **vatnveiting á Heyganesi**.
J. nr. 2005-242
Tekniska Nevnd mælir til at taka undir við tilmæli frá Teknisku Deild, dagfest 9. februar 2006, um at skifta vatnveitingina út, og at 435.000,- kr verða játtaðaðar av íløgukontuni til hetta arbeiði.
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku Nevnd

**Viðv. 28.**
Tilmælini einmælt samtykt.

Jóhan Hendrik Hansen komin aftur á fundin.

**Mál 29.**
Tilmælir frá Havnarnevndini og Fíggjarnevndini um írestandi íløgujáttan til **el- og vatnveiting** til bátabrúgvarnar.
J. nr. 2005-185

Havnarnevndin mælir til at taka av tilboði uppá 78.000 kr frá J.T. Electric uppá el-útgerð til bátahylin, og at upphæddin verður játtað av íløgukontuni.
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Havnarnevndini.

**Viðv. 29.**
Tilmælini einmælt samtykt.

**Mál 30.**
Tilmæli frá Teknisku Deild um **sparkivøll**.
J. nr. 2005-053

**Viðv. 30.**
Tekniska Deild mælir til, at játtaðar verða 160.000 kr til sparkivøllin, og at upphæddin verður játtað av íløgukontuni.

Tilmælið samtykt við 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Jóhan Hendrik Hansen atkvøddi blankt.

Bókin lisin

Fundur lokin kl. $21^{00}$.

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Karl A. Olsen | Jón Mikkelsen | Jákup Oluf Hansen |
| Pauli T. Petersen | Øssur Christiansen | Jóhan Hendrik Hansen |
| Marjun S. Olsen | | |